# Túsund míl - milliónir smíl

TÍÐINDASKRIV

Hvørt ár verða 7-8 milliónir skógvaeskjur við gávum sendar til líðandi og fátøk børn úti í heimi. Seinastu árini eru tilsamans 73 milliónir skógvaeskjur savnaðar inn og latnar víðari til treingjandi børn ígjøgnum tiltakið Operation Christmas Child.

Vit í Føroyum fara aftur í ár at innsavna skógvaeskjur. Seinastu árini hava vit sent 3.000 skógvaeskjur um árið til Rumenia, Serbia og Kyrgistan. Í ár verða eskjurnar væntandi latnar til børn í Rumenia.

At lata jólagávur bjargar ikki heiminum, men øll kunnu gera mun í einum barnahjarta við at lata eina jólagávu. Tað skapar gleði og vón hjá børnum, sum vanliga einki fáa, at fáa eina jólagávu treytaleyst. Vit sum hava so nógv, kunnu geva til tey, sum ikki hava so nógv.

Øll sum vilja geva eina jólagávu, byrja við at fáa fatur á eini skógvaeskju og taka støðu til, um eskjan skal verða til gentu ella drong og hvønn aldur barnið skal hava. Síðani kunnu óbrúktir lutir koyrast í t.d. leikur, skúlaútgerð, lutir innan heilsurøkt, góðgæti og annað. Bræv kann eisini leggjast í, og so kann tað verða, at ein frættir aftur. Reglur eru fyri, hvat ein kann koyra í eina skógvaeskju, sum nærri eru lýstar í faldara, sum liggur á www.livdin.fo og á www.samaritanspurse.org. Felagsskapurin Samaritans Purse ger stórt hjálpararbeiði kring allan heim, harav jólagávuverkætlanin er eitt av teimum mongu átøkunum.

Vegna Christmas Child-tiltakið í Føroyum: Durita Djurholm tel. 230833 / 316099, Beinta Áargarð tel. 512655 / 312655 og Gunnvá Áargarð tel. 584496 / 312655.



# Meinhard Absalon vann »Tekna ein granskara«

TÍÐINDASKRIV



Vinnararnir av 3. umfari av teknikappingini, Tekna ein granskara, eru nú funnir. Tær innsendu myndirnar hava ligið á netinum, har møguleiki hevur verið at atkvøtt fyri teimum.

Nú 3. umfar er runnið, so er greitt, at Meinhard Absalon hevur fingið flestar atkvøður. Nummar tvey gjørdist 12 ára gamla Ása Maria og 11 ára gamli Ingi gjørdist nummar trý.

Vinnaramyndin hjá Meinhard Absalon myndar ein granskara, sum granskar eina krokudillu í Congo.

Hepnu vinnararnir fáa bøkur frá Føroya Skúlabókagrunni.

Vinnararnir fáa bræv frá Granskingarráðnum fyrsta dagin.

Finn vinnaran av 4. umfari og luttak í 5. og seinasta umfari

Tekningarnar, sum luttaka í kappingini í 4. umfari, liggja nú á netinum. Seinasti møguleiki at atkvøða fyri hesum tekningunum er 25.september..

Av tí at tað ikki komu so nógvar tekningar til 4 umfar, halda vit at tað nú er tíð at runda kappingina av. Vit hava tí gjørt av, at seinasta umfar í kappingini verður 5. umfar. Tekningar kunnu sendast okkum til og við 28. september.

### Vinningar: fartelda og fartelefonir

Vilt tú vera við í kappingini um at vinna eina farteldu ella fartelefonir, er tað nú, at tú skalt finna pappír og litblýantarnar fram. Spyr í skúlanum, um flokkurin kann sleppa at tekna í einum tíma, ella bið vinfólkini og syskini tekna saman við tær aftaná skúlatíð. Ein dómsnevnd fer at finna tríggjar bestu tekningarnar millum allar, sum koma inn til kappingina. Jú fleiri tekningar, tú sendir inn, jú størri er møguleikin at vinna.

Allar myndirnar, sum eru komnar inn til teknikappingina, kunnu síggjast á: http://www.heilagrunnurin.fo/teknikapping/

Myndirnar frá aktuella umfarinum liggja sum myndarøð, sum til ber at blaða í. Um tú vilt atkvøða ella síggja, hvussu nógvar stjørnur ein mynd hevur fingið, skal tú trýsta á stjørnuna niðast til vinstru. Síðani kanst tú geva hvørjari tekning millum 1 og 5 stjørnur.

Myndirnar frá undanfarnum umførum liggja í mappu í ovasta vinstra horni.



# Gentan, ið spældi við eld

TÍÐINDASKRIV

Annar partur í svensku tríparta krimirøðini Millennium »Gentan, ið spældi við eld« verður frumsýndur í Havnar Bio fríggjakvøldið 18. september 2009.

Forsølan byrjar mánadagin 7. september 2009 í Havnar Bio.

Fyrsti partur Menn, ið hata kvinnur varð frumsýndur 27. februar 2009. Triði partur Kastellið, sum fór í luftina verður frumsýndur í Havnar Bio 27. november 2009

Tiltakið, sum er partur av 100 ára haldinum hjá Tórshavnar kommunu, byggir á tann veruleika at kommunala Býarbókasavnið í ár verður 40 ár og at svenska tríparta krimirøðini Milennium eru mest læntu bøkur á Býarbókasavninum seinastu árini.

Meiri er at lesa um krimisøgurnar hjá Stieg Larsson undir 27. februar 2009, tá fyrsti partur varð frumsýndur og Jógvan Isaksen heldt fyrilestur um filmin og krimisøgur.

Gentan, ið spældi við eld verður sýnd soleiðis fyrstu vikuna:

Fríggjadag 18.09 kl 18:00 og 20:45 og 23:30
Leygardag 19.09 kl 18:00 og 20:45 og 23.30

Sunnudag 20.09 kl 19:00 og 21:45

Mánadag 21.09 kl 19:00 og 21:45

Týsdag 22:09 kl 19:00 og 21:45

Mikudag 23.09 kl 19:00 og 21:45

Hósdag 24.09 kl 19:00 og 21:45

Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við